skemt



# Trý strævin ár

Tað er strævið at verða sjónvarpsvertur í Japan. Hesar myndirnar sýna vertin í einum tíðarskeiði upp á trý ár – og tað sær út til, at tað hava verið trý óvanliga strævin ár.



## Hetta er mín bóltur

Kurvabóltsspælarin Tim Duncan, sum spælir fyri felagið San Antonio Spurs, vil ikki av við bóltin í dystinum ímóti New Orleans Hornets fyrr í vikuni.



# Skal Joachim giftast aftur

Soleiðis var reaktiónin hjá Fríðriki krúnprinsi og Mary krúnprinsessu, tá tey fingu at vita, at yngri prinsabeiggin, Joachim, skuldi giftast uppaftur.

# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

**Sjáldsamur deyði**
Málið var sjálvandi ognað mamma hansara, sum doyði herfyri, við at peika upp móti himlinum.
Dimma

**Rás2 undir nýtt virkisøkið**
Rás2 er við, tá Byggimessan 2008 letur upp á Hálsi í dag klokkan 14.
Olivant

**Góðir møguleikar**
Tá ið góðir 5 minuttir vóru farnir, svaraði B36 fyri fyrstu ferð aftur og vann tvey brotsspørk, sum tó hvørki gav úrslit í málatsóknum.
Norðlýsið

**Fær ST neyðhjálp úr Burma?**
ST-aðalskrivarin er nú komin til Burma at tingast við hernaðarstýrið um neyðhjálpina
Olivant

**Stuttur steðgur**
Teir høgu oljuprísirnir hava nú við sær, at føroysku svartkjaftaskipini hava avgjørt at gevast við fiskiskapinum á midnátt í kvøld.
Dimma

**Ups, gekk ikki eftir ætlan**
Liðskiparin hjá Chelsea, John Terry, er altráur eftir at vinna finaluna í kvøld. Hann vil sleppa at gloyma vónbrotini frá 2007, 2005 og 2004.
Vikublaðið

# Leyst og fast um stórt og smátt

Dokumentarfilmur um Sandoyartunnilin: „Gerhard Mega Hard".

Gerhard er einasti javnaðartingmaður, sum verjir Ingeborg!

Kári á Rógvi ætlar at plaffa revolvaramennirnar niður, áðrenn teir skjóta ígjøgnum tunnilin.

Merkiligt vit ikki hava hálkubreyt í Føroyum, vit hava nógvar hálar politikkarar.

Fótbóltsdómarafelagið fer at hava aðalfund á BARTALSmessu!

Høvuðsvinningur á Varmakeldu: Ein munnkurv frá ÍF!

Eg vil nú siga, at Jan Højgaard er eina CarlTON(n) betri enn Óli Jacobsen.

# Make-over við Hans Fróða?

Hans Fróði Hansen plagar at duga væl at gera make-over av fólki, men her sær út til, at tað gekk eitt sindur galið. Hvør í allari víðu verða vil verða gulur og coolur?

